# Vestmanna: Meiri pening til íløgur - 14,5 mió krónur!

Hesa upphæddina hevur bygdarráðið í Vestmanna samtykt at nýta til íløgur í ár. Hetta eru 2 mió fleiri, enn nýttar vórðu í fjør. Størsti parturin av hesi upphæddini fer til teknisk mál, nevniliga 9 mió krónur, meðan 3 mió fara til røktarheimið, sum skal byggjast úti á Grønanesi og 1,5 mió til eina víðkan av kirkjugarðinum á Knúgvum. Í ár hevur Vestmanna kommuna haraftrat játtað 250.000 kr. í íløgum til byggibúning, kloakering og renovasjón, eins og peningur er játtaður til aðrar íløgur innan ymisk málsøki í kommununi. Í fíggjarætlanin fyri Vestmanna kommunu fyri 2008 verður roknað við inntøkum uppá íalt 43,4 mió og útreiðslum uppá slakar 52 mió. Upplýst verður, at hetta hallið verður fíggjað við inniogn í peningastovni Hinvegin vísir tað seg, at tað er ikki stórur áhugi at byggja í Vestmanna í løtuni, og at fólkatalið hevur staðið at kalla í stað í nøkur ár. Hetta hendir, hóast nógv arbeiði er í bygdini. - Størsta forðingin fyri vøkstri og menning í Vestmanna er verandi farleið. Eg eri sannførdur um, at bygdin hevði vaksið aftur, um ein tunnil varð gjørdur millum Vestmanna og Leynar, sigur Karl A. Olsen, borgarstjóri í Vestmanna.



# Áttu at kravt avsendara




**Fólk kring landið eru í øðini um eitt adressuleyst pappír, sum er borið út í dag. Eingin avsendari er á, men myndin á pappírinum vísir, hvussu kristiligir flokkarnir eru. Postverksstjórin viðgongur, at stovunurin átti at kravt, at avsendaran varð upplýstur**

VALPROPAGANDA
*Eydna Skaale*
*Eirikur Lindenskov*




*Dulnevnda arkið sum varð borið út í hvørt hús í gjár*

Í gjár varð eitt adressuleyst ark sent í hvørt hús. Avsendarin er dulnevndur ella ikki upplýstur. Myndin á pjesuni vísir greitt, at Miðflokkurin er tann einasti kristiligi flokkurin í Føroyum. Harnæst koma Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin, Javnaðarflokkurin og aftasturerTjóðveldisflokkurin, sum tann mest ókristiligi flokkurin í Føroyum.

Postverkið vil hvørki upplýsa avsendaran, hvør kom við tí til útbering, ella hvør skal hava rokningina. Einasta svarið er, at ein maður kom við tí til útbering og ein ávís fyritøka skal hava rokningina.

Men spurningurin er, um hetta ikki er fevnt av løgtingslóg nr. 135 paragraff 14, har tað stendur, at »Postverkið skal ikki bera út tilfar, sum er ólógligt, ósømilig ella æruskemmandi«.

Onkur politikari hjá Tjóðveldinum hevur vent sær til Postverkið, sum hevur sett sín advokat at kanna málið.

Advokaturin hjá Postverkið Føroya er komin til ta niðurstøðu, at tað verður ikki kunngjørt, hvør ið hevur sent út adressuleysa pappírið, har politisku flokkarnir verða vigaðir.

Arkið, sum Postverk Føroya hevur borið út hvørt hús, hevur skelkað nógv fólk. Eingin avsendari er á arkinum – og tá sjónarmiðini fyri mong minna um sjónarmiðini hjá Miðflokkinum, vendu vit okkum til Miðflokkin at fregnast, um hann hevði nakað við hetta at gera:

- Nei, hatta hevur Miðflokkurin einki við at gera. Tað harmar meg, at slíkt verður borðið út – og eg var bangin fyri, at fólk fóru at leggja okkum undir at senda hatta út. Men tað hava vit ikki gjørt, sigur Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum.

Kári Kjælnes, stuðul hjá Miðflokkinum í Klaksvík, hevur skrivað lesarabræv, har hann heitir á fólk um ikki at velja teir politikarar, ið atkvøddu fyri grein 266b, sum hann kallar Føroya størsta skomm. Men heldur ikki hann kennir nakað til hetta ark, sum Postverkið hevur borið út.

Sostatt er tað framvegis eitt loyndarmál, hvør eigur hesi sjónarmini, sum Postverk Føroya hevur borið til Føroya fólk.

Sofus Clementsen, postverksstjóri, sigur:

- Vit meta hetta vera lógligt at bera út, men tað er á markinum fyri, hvat vit vilja bera út. Tað er eitt eindømi, at tílíkt tilfar verður sent út uttan avsendara. At avsendarin býtir flokkar ella fólk upp eftir, hvussu kristilig ella ikki kristilig tey eru, vilja nøkur fólk helst meta vera ósømiligt. Og tá so avsendarin er dulnevndur, so eru vit í eini støðu, har vit helst eiga at krevja, at avsendari er á tí útsenda, júst talan er um reklamutilfar, sigur Sofus Clementsen.

Postverksstjórin leggur dent á, at Postverkið ikki hevur skyldu til at bera slíkt út, tá tað er reklamutilfar. Eisini vísir Sofus Clementsen á, at um hetta var í einum brævbjálva, hevði Postverkið ikki somu møguleikar at vísa brævinum aftur.

# Miðflokkaveljarar velja ikki kvinnur

**Í veljarakanningini í november í fjør vórðu fólk spurd, um tey høvdu gjørt av at atkvøða persónliga ella uppá listan. Um so var, at tey høvdu gjørt av, so, hvat valevni tey ætlaðu sær at velja. Tey vórðu sostatt ikki spurd beinleiðis, um tey fóru at velja eina kvinnu ella mann**

VELJARAKANNING
*Karin Jóhanna L. Knudsen*
*samfelagsfrøðingur*

Kanningin vísir, at av teimum, ið ætlaðu sær at atkvøða persónliga, eru á leið tveir triðingar kvinnur og ein triðingur menn, ið vildu atkvøtt fyri einum kvinnuligum valevni. Myndin niðanfyri vísir, hvussu lutfallsliga býtið í kanningini er í mun til kyn og tey, ið vildu atkvøtt listan.

Sum sæst á myndini, eru tað flest javnaðarveljarar – 27,9 prosent – ið siga seg ætla at atkvøða fyri einum kvinnuligum valevni og fægst miðflokkaveljarar – 0 prosent.

Samanbera vit úrslitini frákanningini við fólkatingsvalið í 2005, vísir kanningin, at ikki eru stórvegis broytingar í mun til, hvussu stórur partur av atkvøðunum fara til kvinnulig valevni. Á fólkatingsvalinum í 2005 fingu kvinnuligu valevnini 16,6 prosent av atkvøðunum. Í kanningini siga 12,4 prosent av teimum spurdu seg ætla at atkvøða fyri einum kvinnuligum valevni. Kanningin bendir sostatt á, at tey átøk, ið hava verið fyri at økja um kvinnuligu umboðanina, ikki hava havt stórvegis ávirkan á veljaran.

Við í kanningini í november vóru 558 fólk. Av teimum vóru 49 prosent kvinnur og 51 prosent menn.

